# Stórur spenningur um Marjunbrunn



*Tá løgmaður og oljumálaráðharrin vitjaðu á Sovereign Explorer fyrr í summar, og borað varð fyri Statoil. Her saman við einum av Statoilmonnunum*

*Mynd Eirikur*

OLJULEITING
*Jan Müller*

Tað hevur gingið væl at bora hjá Amerada Hess-samtakinum, síðani Sovereign Explorer setti borin í 20. september ella fyri umleið hálvum øðrum mánað síðani. Eftir øllum at døma verður nú borað í sjálvum málinum, ið miðjað varð eftir at raka á umleið 4000 metra dýpi. Tað er ómøguligt at fáa nakað váttað ella avsannað um møguligt fund, men Sosialurin veit frá vælvitandi keldum, at Amerada Hess hevur rakt við »okkurt« í undirgrundini. Spurningurin er bara, hvat hetta »okkurt« er. Sum skilst kann ganga báðar vegir. Tvs. at her kann verða olja ella gasskondensat ella hvørki. Spurningurin tá er, hvat útsløgini merkja.

Ben Arabo, stjóri hjá AmeradaHess hevur valt at hava tunguna mitt í munninum. Hann vil rætt og slætt einki siga. Annað enn at tað hevur gingið sum ætlað, og at teir koma at brúka tveir mánaðir til boringina sum upprunaliga ætlað. Tvs. at boring og logging verður alt liðugt um hálvan november.

Tað skilst, at boringin hevur ligið still í nakrar dagar í tí ringa veðrinum, men at tað hevur verið loggað tvs. at mátitól eru koyrd niður í holið. Uttan iva eru tað hesi mátitólini, sum nú skulu til at kanna, hvat er í brunninum ella um nakað er av áhuga.

Sosialurin veit, at vónirnar at finna okkurt áhugavert longur uppi í brunninum hildu ikki. Onkur smávegis oljuspor hava helst verið men heldur ikki meira enn tað. Nú verður so alt álit sett til høvuðsmálið í dýpinum, og komandi dagar fara at vísa, um Amerada Hess, Dong, British Gas og Atlants Kolvetni hava funnið olju ella gass í Marjunbrunninum. Sum støðan er í løtuni bendir okkurt á, at tað kann ganga báðar vegir.

-Eg eri sera spentur um hesa boringina sigur Eyðun Elttør í eini viðmerking. Hann fylgir væl við, hvat hendir. Hann vónar, at eitt fund verður gjørt nú. Vit eiga at tola at fáa boðini, at eingin olja er, og at olja er. Vit hava fyrireikað okkum í langa tíð, og tí eiga vit eisini at taka ímóti tí avbjóðingini.


## Føroya Tele í Suðuroy søkir eftir fólki

"Tað er góðskan av tínum arbeiði, sum vil gleða Guð – ikki nøgdin"
Mahatma Gandhi



Til okkara deild í Suðuroynni verður søkt eftir fólki at byrja skjótast til ber.
Á Føroya Tele í Suðuroy starvast í alt 9 fólk. Nýggja fólkið skal saman við øðrum starvsfólkum á deildini vera við í menningini av niðanfyristandandi uppgávum.

- Skráseting av kaðalneti
- Telefon og kunda avgreiðslu
- Vøru og goymslustýring
- Telebúðar avgreiðsla
- Aðrar uppgávur eftir tørvi.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert starv í mennandi og avbjóðandi umhvørvi, við góðum arbeiðsumstøðum

**Útbúgving og førleikar hjá umsøkjarum:**
Tekniskur assistentur ella líknandi viðkomandi útbúgving.
Tað er ein fyrimunur, at tú í stóran mun kanst arbeiða sjálvstøðugt, er opin og dugir væl at samstarva og tosa við viðskiftafólk og hevur royndir við EDV á brúkarastøði.

Arbeiðsstaður er Føroya Tele á Tvøroyri.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Tele og Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fróða Mortensen, økisleiðara tel. 371000 ella starvsfólkadeildina tel. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. november 2001

**Umsóknir skulu sendast til**
Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!




# Leitingin her lopfjøl út í heim



*Løgmaður hittir Peter Hain, táverandi oljumálaráðharra í London. Á tí fundinum var eisini tosað um møguleikan at menna samvinnuna, tí m.a. hevur ført til, at føroyskt oljufelag kann vera við í leiting í bretskum øki.*

*Mynd jan*

FØROYSK OLJUFELØG
*Jan Müller*

– Tað er gott fyri Føroyar og føroyska oljuvinnu, at eitt av okkara egnu oljufeløgum nú kann arbeiða og virka uttan fyri landoddarnar sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður, nú Atlants Kolvetni hevur fingið góðkenning frá bretskum orkumyndugleikum at arbeiða í bretskum øki. Landsstýrismaðurin sigur, at hetta hevði neyvan nakar trúð fyri fáum árum síðani. Nú er tað so veruleiki, og tað er gott. Líkt er til, at luttøka í leitingini í føroyskum øki hevur verið ein lopfjøl út á bretska landgrunnin og í Norðsjógvin.

Eyðun Elttør dylur ikki fyri, at vitjaninar hjá løgmanni og sær sjálvum í Bretlandi kunnu hava gjørt sítt til, at hetta er komið í lag. Eftir at bretsk feløg fingu leitiloyvi í Føroyum hava umboð fyri myndugleikarnar har úttalað seg um, at teir vilja royna at menna samvinnuna millum bæði londini. Eitt nú vitjaðu Anfinn Kallsberg, løgmaður og Herálvur Joensen, leiðari í Oljumálastýrinum hjá DTI í London, har orkumálaráðharrin hevur skrivstovu. Tá nýtti løgmaður m.a. høvi til at tosa við táverandi ráðharran í oljumálum, Peter Hein, sum í dag er Europa-ráðharri hjá bretsku stjórnini. Herfyri nýtti eisini Eyðun Elttør høvi at hitta núverandi orkumálaráðharran Brian Wilson. Tað var tá føroyingar luttóku á oljuráðstevnuni í Aberdeen.

Eyðun Elttør fylgir eisini boringini á føroyska landgrunninum við stórum spenningi. Hann heldur tað er ov tíðliga at fella í fátt, nú tvær boringar ikki hava givið nøktandi úrslit og tann triðja kann enda við tí sama. – Skuldi tað hent, at eisini henda triðja boringin er turr, so eigur tað ikki at steðga okkum í at halda fram. Agip skal jú bora næsta ár og síðani koma fýra boringar aftrat. Úrslitið av hesum trimum fyrstu boringunum hevur eisini stóran týdning fyri brunnin, sum Agip fer at bora. So vit eiga at síggja boringarnar í 1. útbjóðing sum eina heild, har vitan frá eini boring kann vera týðandi grundarlag undir komandi boringum.

Eyðun Elttør heldur eisini, at vit skulu meta boringarnar hinumegin markið sum av stórum týdningi fyri Føroyar eisini, tí fund har eru í veruleikanum fund í »okkara« øki siga vit, at jarðfrøðin ikki setir mørk. Landsstýrismaðurin fylgir tí boringinum á bretskum øki við eins stórum áhuga sum tær á føroyska landgrunninum. Man kann tí siga, at í veruleikanum verða gjørdar kanska einar 15 til 20 boringar í øllum økinum næstu árini heldur enn bara tær átta, sum verða gjørdar í júst okkara parti av Atlantsmótinum. Vit skulu neyvan heldur vera kløkk, um tað verða gjørdar uppaftur fleiri boringar, um onkur av teimum átta brunnunum gevur úrslit.

Eyðun Elltør vónar sjálvandi, at fund verða gjørd nú, men hann útilokar ikki møguleikan fyri enn eini útbjóðing í næstu framtíð. – Sjálvandi fer tað at hava óhepna psykoligska ávirkan, um allir brunnarnir eru turrir, men vit mugu tó rokna við 2. útbjóðing í 2003 ella so. – Mest umráðandi er ikki at missa mótið, tí hyggja vit at gongdini í bæði norskum og bretskum øki, tá teir fóru undir at leita, so vórðu boraðir ávikavist umleið 30 og 70 brunnar, áðrenn oljufund varð gjørt.




*Herálvur Joensen, stjóri í Oljumálastýrinum her uttanfyri skrivstovuna hjá DTI, sum hevur gjørt eitt stórt arbeiði fyri at fáa Atlants Kolvetni góðkenning í bretskum øki*

*Mynd jan*

## Neyvan gigantfelt við Føroyar

**– men tó so mikið stór, at tey eru sera áhugaverd sigur danski jarðfrøðingurin Morten Sparre Andersen**



*Morten Sparre Andersen helt nú um dagarnar fyrilestur í Havn um føroysku undirgrundina.*

*Mynd Jens Krisjan*

OLJULEITING
*Jan Müller*

Nú tveir av brunnunum, sum boraðir eru við Føroyar, hava verið turrir er ivi um Føroyar nakantíð fara at gerast eitt stórt oljuøki eins og t.d. Kuwait, sum onkur annars hevur spátt um. Ein teirra, sum ivast í hesum er Morten Sparre Andersen, sum hevur arbeitt hjá donskum og føroyskum jarðfrøðiligum myndugleikum í mong ár og sum hevur stóran kunnleika til føroysku undirgrundina.

Hann hevur fylgt gongdini í Føroyum seinastu 17 árini, harav verið í Føroyum í seks ár.

Hann er utbúgvin sum jarðfrøðingur og geofysikari.

Morten Sparre Andersen sigur, at stórar og góðar fyrireikingar eru gjørdar undan leitingini og hevur Oljumálastýrið gjørt eitt sera professionelt arbeiði eisini oljufeløgini.

Av tí at feløgini hava bundið seg til at bora fleiri brunnar, so er møguligt, at tey ikki neyðturviliga bora tey bestu prospektini alt fyri eitt men bora eftir tí bestu raðfylgjuni. Hóast man eftir tvær boringar ikki gjørt nakað veruligt fund er tað tó staðfest, at her er ein virkin oljuskipan. At at tað er ein virkin oljuskipan gevur orsøk til at halda, at næstu boringarnar eru væl grundaðar.

– Eg havi góðar vónir til tær komandi boringarnar. Men úrslitið higartil gevur okkum ta fatan, at Føroyar-Hetlandsrennan er neyvan eitt ovurstórt oljuøki ala Kuwait sigur Morten Sparre Andersen. Føroyar koma at minna um Danmark og Holland, hvat fundum viðvíkur. Men í mun til føroyska búskapin so finst helst nógv olja her, men vit skulu sum nevnt ikki ímynda okkum eina Kuwaitgongd. Heldur at tað verður funnin olja í avmarkaðum nøgdum.

Tað er framvegis møguleiki at finna stór felt, men neyvan gigantisk felt, nú tvær boringar ikki góvu nakað úrslit. Men man skal helst til at hugsa nýggjar tankar í framtíðini. sigur hann, sum annars vísir á, at tað er nógv olja í Clair hinumegin markið men torført er at koma til hana. Schiehallion og Foinaven eru tó stór felt.

Morten Sparre Andersen heldur ikki, at áhugin fer at minka sjálvt um tríggir brunnar verða turrir. – Um allir 8 brunnar í 1. útbjóðing eru turrir, so fer tað sjálvandi at ganga seinni enn ætlað. Men vit mugu ikki gloyma, at hesir átta brunnarnir eru í einum basengi. Vónir eru um, at vit kunnu finna onnur baseng longur norðuri í Føroyar-Hetlands-rennuni ella aðrastaðni í Føroyaøkinum, sum eru áhugaverd fyri leiting seinni.

Men tá fyrstu 8 brunnanir eru boraðir í Foinaven bassenginum so hevur ídnaðurin eitt sera gott grundarlag til at meta um basengið og tað kann so eisini henda, at feløgini vilja bora uppaftur fleiri brunnar. Men olja skal helst finnast við hesum 8 brunnunum.

Morten Sparre Andersen vísir á, at fleiri brunnar verða boraðir hinumegin markið og hesum eiga vit at at vísa stóran ans. Føroyingar kunnu fáa góða vitan við hesum boringum, tí jarðfrøðin kennir eingi mørk.

Annars heldur Morten Sparre Andersen, at eisini nýggju ára loyvini við Føroyar eru áhugaverd, tó at tey ikki nú bera nakra boring í sær. Men tað kann gerast ein sera stór avbjóðing at vita, um olja er undir basaltinum.